


VERKAMENN: Tað er hart arbeiði, men teir eru sínir egnu harrar. Sosialurin hevur verið til arbeiðis saman við skrellimonnunum í Klaksvík ein dagin í mars



# Liva av

*Dánjal Højgaard*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Tað gongur við rúkandi ferð.

Hann setir hondina niður á garðin og syftir seg seg uppum. Við risafetum gleivar hann tvørtur um grasplenuna, og eitt-tvey-trý, so er posin skiftur og ein nýggjur settur í.

45 ára gamli Ólavur Johannesen hevur einki ímóti at leypa um har garðurin er lægstur. Tess stytri leiðin er til skrellispannina, tess fyrri fær hann frí.

»Nei, mann hevur verið ov leingi í yrkinum«, venar hann seg blídliga, og syftir sekkin upp á nakkan. »Tað eru knøini. Tað er eitt sindur strævið at ganga og bera upp og niður gjøgnum trappur«, sigur hann og sleingir sekkin frá sær úti á vegnum.

**Strævnasti dagur**

Tað er týsdagur og klokkan er farin av 10 fyrrapartin.

Skrellimennirnir hjá IRF hava verið í sving síðani klokkan sjey í morgun. Longu um tríggjar tímar skulu teir vera lidnir, tí tá skal ruskbilurin við Ternuni til Lorvíkar. Teir eru tríggir, sum taka húsarhaldsruskið í Norðoyggjum, og sum eru knýttir at Roða; ruskbilinum, sum stendur á Bumshamarsvegi og hurrar og tekur alt ruskið inn í sín stóra kjaft.

Arbeiðsvikan hjá skellimonnunum liggur í føstum karmum. Mánadag verður ruskið tikið frá bygdunum norðanfyri. Klaksvíkin verður tikin í trimum tørnum - týsdag, mikudag og hósdag.

Týsdag verður byrjað á Bumshamri - norðast á vestara armi - og haðani arbeiða teir seg spakuliga inn móti miðbýnum.

»Hetta er tann strævnasti dagurin«, suffar 36 ára gamli Thom Jakobsen, sum er yngstur og fastur sjafførur á liðnum. »Tað eru so nógvar síðugøtur. Beint her er stutt til spannirnar, men tá ið vit koma longur yvir verða fleiri langar og tungar brekkur«.

Arbeiðsgongdin á liðnum er føst. Ólavur og starvsfelagin Brynjálvur tøma skrellispannir og savna sekkirnar saman við vegjaðaran, og Thom ber so í bandi, at teir verða tiknir upp í bilin.

**Fullir av fiski**

Ólavur baksast við ein tungan sekk, sum er á tremur. Tað lekur úr endanum, tá ið hann fer dragsandi avstað við honum. Her er fiskarusk í.

»Her er nakað nógv. Hann vigar kanska 50-60 pund«, sigur skrellimaðurin blídliga. »Teir kunnu gott viga upp ímóti 100 pundum. Hava menn verið á floti verður slógvið koyrt burtur, og tað vigar eina asins rúgvu«, sigur Ólavur, sum nóg illa fær borið sekkin.

Thom heldur, at tað er so sum so við virðingini fyri skrellimonnunum:

»Summi virða okkum ikki ein pinn. Tey liggja og fylla fiskarusk í sekkirnar, so at tú slett ikki fært borið teir. Teir sekkirnir eru virkuliga fúlir at taka. Posarnir eru ikki heilt tættir og so rennur tað niður á klæðini. Vit eru hóast alt menniskju«, gremur hann seg stillisliga.

Sambært skrellimonnunum eiga fólk sjálvi at beina fyri lívrunnum burturkasti sum fiskaslógvi. Skrellispannirnar mugu ikki standa aftanfyri húsini, men móti vegnum, so at tær eru lætt atkomuligar hjá skrellimonnunum. Og harafturat mugu sekkirnir ikki fyllast á tremur. Hetta hava fólk fingið at vita í einum skrivi, sum er sent út í húsini. Men boðini verða ikki altíð fylgd.

»Nei, nei, vit eru ov lagaligir« flennir Ólavur. »Einaferð fann eg eitt av skrivunum í eini skrellispann. Eg tók eg tað úr posanum og legði tað á lokið. Tey høvdu ikki so mikið sum lisið skrivið«.

**Tosa um sólina..**

Í løtuni er kavarok. Skrellimenninir eru farnir í tey appelsingulu oljuklæðini hjá IRF, og Ólavur er í føroyskum undirklæðum innan undir. Tað er heldur óarbeiðsligt og kvalið at vera so væl ílætin, sigur Ólavur, og fegnast um, at ein húsaeigari sjálvur hevur sett rusksekkin út á vegin. Slíka hjálp eru skrellimennirnir ikki forvandir við.

»Vit liva jú í Føroyum so mann veit aldrin hvussu mann skal lata seg í. Í morgun var av allar fagrasta veðri – brennandi sól. Nú er kavarok. Men tað man bara vera eitt æl«, sigur hann bjartskygdur og kveitir upp á luftina. Og ikki er meira enn hálvtalað orð so slítir í og sólin fer at skína.

»Ja, ja, staðfestir skrellimaðurin, vit eru enn í Klaksvík«.

Meðan hann koyrir Roða spakuliga suður ímóti Klaksvíkar sjúkrahúsi fortelur Thom, at tað skal nógv til fyri at ein skrellimaður setist aftur fyri veður.

»Í vetur hevur eingin dagur verið, har vit eru setstir aftur fyri veður. Onkuntíð hava vit kortini verið noyddir at farið til hús aftur fyri hálku, og so eru vit byrjaðir aftur seinni. Nei, tað er bara at herja á! sigur Thom.

So rýkur hann á dyr. Við fáum risafetum gleivar hann oman ígjøgnum ein brattan skráa og tvørturum eitt tún. Hann er um at vera hongdur í einum snótratræ á veg yvir til skrellispannina.

»Eg havi einaferð fingið handan snórin um hálsin. Nú veit eg av honum, sigur Thom og tveitir sekkin inn í ruskbilin.

**Mistonkiligir kundar**

Ólavur skorar seg millum eini hús og eitt elektriskt hegn. Balanserar eftir einum betonggarði og sleppur posanum niður á vegin uttanfyri. Í næstu løtu eru vit hálvavegna inni í einum kjallara. Hóast fleiri hurðar eru at velja ímillum fer Ólavur beina kós yvir til ta røttu. Eftir18 ár í yrkinum kennir Ólavur hvørja skrellispann í Norðoyggjum.

»Eftirhondina kennur mann hvørt einasta hús út og inn. Eg kundi gingið í myrkri um tað skuldi verið, sigur Ólavur og heilsar upp á eina eldri konu í einum duraopi.

»Koma tit frá Sosialinum«, spyr hon so altrá. »Skulu skrellimennirnir bera Sosialin út so kemur hann ongantíð í postkassan«, stingur hon Ólav, og skundar sær at slætta sjógvin: »Eg havi stóra virðing fyri teimum. Teir gera eitt ruddiligt arbeiði«, sigur hon so hittinorðað, áðrenn Ólavur skundar sær víðari við trimum sekkum á bakinumi.

So blíð eru øll kortini ikki við skrellimenninar.

Ólavur fortelur um hina ferðina, tá ið teir fyrstu ferð vóru í Haraldsundi eftir ruski. Tá ið ein kona, sum stóð uppi í bønum við rívu í hond, misskilti tað heila.

»Hon kom við ferð oman eftir. »Nei, ikki talan um« sigur hon »teir skulu einki hava frá okkum«. Hon hevði ikki ánilsi av, hvat tað heila snúði seg um. Hon helt, at tað var okkurt sum kostaði eina asins rúgvu. Men tá ið vit høvdu forklárað fingu vit skrellið við okkum kortini«, minnist hann.

**Í toppformi**

Brynjálvur Jensen er á veg niðan eina av tyngstu brekkunum á týsdagsteinium. Komnir niðan til skrellispannina, sum stendur einar hálvthundrað metrar frá Víkavegi, hevur blaðmaðurin næstan mist ondina. 50 ára gamli Brynjálvur letst ikki um vón. Hann er úthvíldur.

»Venjing skal til«, forklárar hann. »Ert tú nýggjur og óvanur er skjótt at limirnir ganga fyri. Tað er sum við fótbóltsspælarunum. Tú skalt hava góða heilsu, hita væl upp og vera kvikur« sigur aldursforsetin á liðnum.

Brynjálvur hevur verið skrellimaður í níggju ár. Hann var sjómaður í nógv ár áðrenn hann fór í ruskið, og beinini toldu ikki skiftið.

»Tá eg hevði arbeitt í einar tveir mánaðir gingu beinini fyri og eg lá sjúkur í tríggjar vikur. Eg hevði staðið stillur á einum skipsdekki og sitið so nógv í bili, at beinini máttu læra seg at ganga aftur. Síðani tá havi eg ongan sjúkradag havt. Ikki ein!« staðfestir hann, og sleingir posarnar, hann hevur savnað saman í brekkuni upp í reyvina á Roða.

Brynjálvur sigur, at tað var tilvildin, sum gjørdi at hann bleiv skrellimaaður. Hann varð biðin at koma til arbeiðis ein morgun, og síðani hevur hann verið hangandi

»Eg veit ikki«, sigur hann, og flennir stillisliga, tá ið hann verið spurdur, hvussu honum dámar arbeiðið. »Eg havi verið her í skjótt tíggju ár, so eg veit ikki. Jú, jú, skuldi eg valt millum hetta og flakavirkið, so vil eg nógv heldur vera her. Her ert tú úti og sleppur at ráða



# K@T@-hornið

**Nr. 3 · hósdagur · 30. mars 2000 · 74. árgangur**

**Tíðindablaðið Sosialurin,** Postboks 76, 110 Tórshavn, Telefon 311820, Telefax 314720 • **T-postur til KT-hornið**: kthornid@sosialurin.fo • **Lýsingar**: lysing@sosialurin.fo • **Ábyrgdarstjóri**: Jan Müller
**Blaðstjórn:** Steinbjørn í Dali, Finn Jensen • **Layout og uppseting:** Tíðindablaðið Sosialurin • KT-hornið er fastur táttur í Sosialinum hósdag • Evsta mark fyri lýsingar er mánamorgun kl. 10.00.

## Innihald

Síða 1. **MP3.com -eitt alternativ ella ein hóttan.** Grein um MP3.com og MP3-fílar. **Smátíðindi.**

Síða 2. **Torkil Holm Petersen, stjóri í Formula.fo skrivar grein hann kallar KT og fiskivinnutøkni.** Torkil viðger millum annað kappingarførið hjá føroysku KT-virkjum innan KT í fiskivinnuni. **Spurnakassi**. Lesari spyr um MP3-fílir eru lógligar. **Prískanningin** hesaferð er um RAM.

Síða 3. **Teldustøðingar.** Sveinur Tróndarson skrivar grein eftir prát við Heðin Samuelsen um teldustøðingaútbúgvingina frá byrjan til í dag.

Síða 4. **Heimasíðu ummæli** hesa ferð er um KT-Depilin. **Smátíðindi.** **Káta Hornið**. **Topp-10 listin** sum er um atkvøðigreiðsluna um fullvedi á Olivant.fo.


Finn Jensen


Steinbjørn í Dali

## Smátíðindi

### Formula.fo útflutti í 1999 fyri 6 mio. kr.

**formula.fo**
*fremst innan KT*

1999 varð eitt gott ár fyri flestu KT-virkini í Føroyum. Formula.fo, sum helst er tað størsta KT-virkið í Føroyum, um FøroyaTele ikki verður tikið við, útflutti í fjør fyri 6 milliónir krónur, av einum samlaðum umsetningi uppá 66 milliónir krónir. Av hesum útflutningi umboðar eginframleiðslan av software umleið 2 mill., meðan hinar 4 mill. eru vørur sum eru exporteraðar saman við øðrum samstarvspørtum.

### Atgongd til 300.000 MP3 musikkfílar við NAPSTER

Forritið **Napster**, sum herfyri bleiv forbjóðað av amerikonskum universitetum, er nú góðkent og kann brúkast av næmingunum á Indiana University.

Forritið er ókeypis og kann takast niður á www.napster.com. Tað er 600 KB stórt. Talan er um eitt chatforrit, har fólk úr allari verðini kunnu møtast og býta um sínar MP3 fílar. Tá KT-hornið royndi forriti mánadagin, vóru meir enn 300.000 MP3 titlar tøkir hjá einum og hvørjum og eru teir helst allir ólógligir.

Ein nýggj útgáva av Napster-forritinum er á veg á marknaðin, sum kann kopiera videofilmar og forrit á sama hátt sum MP3 fílarnar. Hesar útgávur eita Wrapster og Gnutella.

Óneyðugt er at siga at Napster er saksøkt av fakfelagnum fyri amerikanska tónleikaídnaðin RIAA, men enn er onki komi burturúr hesum sakarmáli.

### Ravtøkniligar postsmogur

Sum greitt frá í greinini um KT-Depilin, er nú møguleiki hjá teimum ungu, at práta saman gjøgnum alnótina, við tað at allir næmingar hava fingið eina postboks á síðuni.

Vit fara her at gera eina lítla samanlíkning av gomlu postboksunum, og teimum ravtøkniligu postsmogunum. Útgangsstøði verður tikið í postboksunum hjá Postverkinum, og teimum hjá Føroya Tele.

Eins og Føroya Tele, roynir Postfelagið av øllum alvi nú at fáa Postverkið Føroya til eitt alment partafelag. Felags fyri stovnarnar er, at báðir bjóða postflutning. Tó tykist tað tøkniliga at vera fleiri øldir millum skipaninar, men er tað nú tað.

Nógv bendir á, at skipanin við teimum nýggju postsmogunum er meinlík tí gomlu, talan er bert um annað tilfar og ein eitt sindur øðrvísi framfarðarhátt.

Um vit taka støði í postboksskipanini hjá Postverk Føroya, sum vit kenna hana, virkar ein ravtøknilig postboksskipan nakað soleiðis:

**1.** Tá vit tekna eina Olivant íbinding fáa vit, við í prísinum, eitt petti av Olivant servaranum til postnýtslu. Hetta svarar til at vit leiga eina postboks frá Postverk Føroya.

**2.** Tá so onkur sendir okkum ein mail, verður fílurin lagdur eitt stað á Olivant servaran, ið bert ein sjálvur hevur atgongd til. Hetta svarar til at eitt bræv verður lagt í boksina hjá Postverkinum.

**3.** Næstu ferð vit ringja 1615, og fáa samband við alnótina, kunnu vit, við at starta eitt nú Outlook, heinta post okkara. Hetta svarar til at vit fara ein túr oman á Posthúsið og lata postboks okkara upp, og heinta postin.

Sum sagt, næstan sama mannagongd, bert eitt sindur lættari. Loyniorðið vit hava fingið frá Føroya Tele svarar soleiðis til lykilin til postboksina hjá Postverkinum.

Um vit fyri bert fáðum árum síðan høvdu sett spurningin, um Postverki og Telefonverkið fóru at kappast í framtíðini, vildi svarið hjá teimum flestu óiva verið nei. Enn ein triumfur fyri KT-menningina, er tað gott — tað bestemmar tú sjálv/ur.

Skrivað:
Finn Jensen
**finn@sosialurin.fo**

## Mp3.com
## – eitt alternativ ella ein hóttan



*Mp3.com er ein risastór fyritøka, ið vinnur pening sín á Alnetinum. Harafturat er MP3 eitt sokallað format. Tvs. at fílir kunnu goymast og heintast í formatinum, mp3.*

Eins og við øllum øðrum fílum, eru mp3 fílirnar tengdar at ávísum forritum. Eins og fílir av slagnum doc eru tengdar at Microsoft Word, og fílir av slagnum xls eru tengdar at Microsoft Excell, eru fílir av slagnum mp3 tengdar at eitt nú Win Amp, ið er eitt forrit ið kann spæla tónleik — also eitt multimedia forrit.

Á síðuni www.mp3.com, kunnu vit millum annað lesa, at Mp3 er eitt fílaslag. Við hjálp av mp3 fílum, kann ein spara pláss á harddiskinum, um ein vil hava eina rúgvu av tónleiki liggjandi. Eitt lag, ið varðar einar 3-4 minuttir, tekur umleið 3-4 megabyte av plássi á diskinum, um lagið er í mp3 formati. Um lagið á hin bógvin var lagt inn *vanliga*, vildi tað tikið eini 40-45 megabyte av harddiskinum. Mest nýtti mp3 spælarin nevnist *WinAmp*, ið er eitt sonevnt *shareware*, ið merkjur at forritið er ókeypis at heinta og nýta.

Men hvat er tað so sum er so ólógligt við mp3, og hví er ein slíkur ruðuleiki komin í allan tónleikaíðnaðin av hesum fílaslagi?

Magnus S. Petersen, advokatur svarar í spurnakassanum í dag spurningi frá einum lesara um MP3 fílar eru lógligir ella ikki. Fyrst og fremst kunnu vit siga, at tað í dag er sera lætt at leggja mp3 fílar á Alnetið, uttan at geva sær far um lógina um upphavsrætt. Harafturat er tað sjálvsagt sera skjótt at heinta eina mp3 fíl av alnetinum, við tað at hon tekur minni pláss, enn ein sangur vanliga vildi gjørt.

Tað sum í dag stendir eftir er, at tónleikarar í longdini koma at selja færri fløgur, tí fólk kunnu heinta fílirnar sjálvi á alnetini, uttan at gjalda so mikið sum eitt oyra. At Mp3.com er komið eitt sindur í óføri av hesum, hevur eisini merkt annlitið hjá fyritøkuni úteftir seinastu mánaðirnar. Eitt nú hoyra vit at fyritøkan stuðlar konsertferðum hjá kendum nøvnum sum Sting, Backstreet Boys og Mariah Carey. Hetta er óiva fyri at bera í bøtuflaka, men spurningurin er, um tað ikki er ov seint nú.

Vit kunnu ímynda okkum eitt samfelag, um eini tvey ár, har ravtøkniliga útgerðin hjá vanliga húsarhaldinum er nógv meira samlað enn hon er nú. Eitt nú kunnu vit rokna við, at allur tónleikur verður heintaður á Alnetinum, nógv skjótari enn í dag, og síðan er bara at blanda nakrar mappur á harddiskinum, og spæla tónleikin til ávís endamál, beinleiðis av telduni og gjøgnum steroeanleggið, ella hvat tað nú verður kallað tá.

Ringt er eisini at ímynda sær, at fløguhandlarnir hava nakra framtíð í hesum høpi. Teir vera í øllum førum fluttir inn á Alnetið, og tónleikurin verður helst seldur í øðrum formatum enn í dag. Ikki á fløgu, men sum mp3, mp4, mp5 ella okkurt heilt annað — livst, so spyrst.

Sum sagt, so er fyritøkan Mp3.com komin í ringt orð hjá tónleikarum og øðrum, og nú leggur fyritøkan seg eftir at stuðla tónleikarunum. Fyritøkan lýsir eisini við ymsum tónleiki á framsíðuni, og ein nýggjur møguleiki hjá tónleikarum at selja tónleikin er júst gjøgnum heimasíðuna hjá Mp3.

At Mp3 hevur fingið eins leiklut og MTV, tá talan er um at *promóta* tónleik er sligið fast, og av tí at hetta ofta viðførir, at tónleikurin kann útvegast ókeypis, mugu tónleikarar sláða seg til tols, nýta hendan reklamuhátt, og vinna peningin aðrar vegir enn gjøgnum sølu av fløgum og líknandi. Eitt nú viða royalties og annað gjøgnum útvarpsrásir og sjóvnvarpsrásir — sum forrestin ivaleyst koma at senda á Alnetinum í framtíðini.

## Mp3 satsar uppá tónleikin

Sum sagt, so er fyritøkan Mp3.com komin í ringt orð hjá tónleikarum og øðrum, og nú leggur fyritøkan seg eftir at stuðla tónleikarunum. Fyritøkan lýsir eisini við ymsum tónleiki á framsíðuni, og ein nýggjur møguleiki hjá tónleikarum at selja tónleikin er júst gjøgnum heimasíðuna hjá Mp3.At Mp3 hevur fingið eins leiklut og MTV, tá talan er um at *promóta* tónleik er sligið fast, og av tí at hetta ofta viðførir, at tónleikurin kann útvegast ókeypis, mugu tónleikarar sláa seg til tols, nýta hendan reklamuhátt, og vinna peningin aðrar vegir enn gjøgnum sølu av fløgum og líknandi. Eitt nú via royalties og annað gjøgnum útvarpsrásir og sjóvnvarpsrásir - sum forrestin ivaleyst koma at senda á Alnetinum í framtíðini.

Skrivað: Finn Jensen
**finn@sosialurin.fo**